FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 23. september 2022
J. nr.: 22/15769
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-025/2022 frá Henrik Old, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um gjaldið frá Strandferðsluni til Tórshavnar havn

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvat Strandferðslan rindar í leigu fyri parkeringsøkið á Bursatanga?
2. Hvat kostar tað hjá Strandferðsluni at leiga tornið til at ganga umborð á Smyril?
3. Hvat kostar tað hjá Strandferðsluni at leiga pakkhús og skrivstovu á kaiini?
4. Hvussu nógv rindar Strandferðslan í havnargjaldi fyri Smyril til Tórshavnar havn?
5. Hvat er gjaldið hjá Strandferðsluni fyri ferðafólk og bilar, sum fara umborð á Smyril umframt samlaða gjaldið fyri 2021?
6. Hvussu nógv rindar Strandferðslan fyri bingjur og last fyri virksemið á Bursatanga?
7. Hvat er sostatt samlaða gjaldið hjá Strandferðsluni til Tórshavnar havn?

Svar til spurning 1, 2, 3 og 6
Strandferðslan rindaði 1,0 mió. kr. í leigu til Tórshavnar Havn í 2021. Leigan av farstøðini, økinum til bilar, bussar, bingjur og sleip kostaði 754 tús. kr. Trapputornið kostaði 237 tús. kr., og at leiga skrivstovu í farstøðini kostaði 35 tús. kr.

Svar til spurning 4 og 5
Strandferðslan rindaði 3,62 mió. kr. í havna- og brúgvagjaldi til Tórshavnar havn. Av hesum 3,0 mió. kr. fyri Smyril (Suðuroyarleiðina), og 622 tús. kr. fyri Ternuna (Nólsoyarleiðina).

Harumframt rindaði Strandferðslan 2,1 mió. kr. í vørugjaldi. Av hesum 1,8 mió. kr. fyri Smyril og 271 tús. kr. fyri Ternuna. “Vørugjaldið” er fyri ferðafólk, bilar, bingjur, lastir og tílíkt.

Strandferðslan rindar 4 kr. fyri hvørt ferðafólk (undantikið skúlabørn, barnagarðar o.a.), 8 kr. fyri hvønn persónbil og 16 kr. fyri størri akfør og sleip, sum koma í havn ella bryggju hjá kommununi. Tað merkir, at Strandferðslan rindar bæði, tá ið komið verður til Nólsoyar og til Havnar. Landið eigur hinvegin havnina á Krambatanga.

Svar til spurning 7
Samanumtikið var leigukostnaðurin hjá Strandferðsluni 1,0 mió. kr., havna – og brúgvagjaldið var 3,62 mió. kr., og vørugjaldið 2,1 mió. kr. Samlaðu útreiðslurnar hjá Strandferðsluni til Tórshavnar havn vóru sostatt 6,73 mió. kr. í 2021. Sí eisini talvuna niðanfyri.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Gjøld til Tórshavnar Havn í 2021	**tús. kr.**
Leiga av farstøð, øki til bilar og bussar	754
Leiga av trapputorni	237
Leiga av skrivstovu á farstøðini	35
Havna- og brúgvagjald, Smyril	2.995
Havna- og brúgvagjald, Ternan	622
Vørugjald: ferðafólk, bilar, bingjur og lastir, Smyril	1.814
Vørugjald: ferðafólk, bilar, bingjur og lastir, Ternan	271
Gjøld tilsamans, útreiðslur	**6.728**

Tinganes, 23. september 2022

Uni Rasmussen
landsstýrismaður í fíggjarmálum